## Spælarar mugu niður í løn

Feløgini í donsku superliguni hava tað trupult fíggjarliga, og nógv av feløgunum hava stór hall. Roknað verður við, at feløgini í ár koma at hava 375 milliónir krónur í halli samanlagt. Fótbóltsøkonomurin Jesper Jørgensen heldur, at spælararnir koma at merkja hetta. - Nýggju sáttmálarnir, sum fara at verða gjørdir, verða á lægri støði enn teir hava verið seinastu árini. Eg rokni við, at spælararnir skulu venja seg við at fáa 20 prosent minni í løn, sigur hann.



## Ancelotti nøgdur við hópin

Venjarin hjá Chelsea hevur ongar ætlanir um at keypa nýggjar spælarar til felagið í januar, tá ið flytingarvindeygað letur uppaftur. Oddaliðið í Premier League hevur vist stórform seinastu tíðina, og tað ger Carlo Ancelotti tryggan við hópin hjá sær.
- Allir spælararnir eru væl fyri, og um hetta heldur fram, ætla vit ikki at keypa nakran nýggjan spælara í hesum kappingarárinum, sigur Ancelotti sambært The Sun.



Føroyska svimjilandsliðið fekk frálíkt úrslit, tá tað um vikuskiftið eydnaðist at vinna tryggan sigur á íslendsku grannum okkara

# Vunnu svimjilandsdystin

**Hóast íslendingar vóru favorittar, so eydnaðist tað føroyska svimjilandsliðnum at vinna fyrsta landsdystin móti grannunum**

Fyri fyrstu ferð svumu Føroyar og Ísland um kapp í landsdysti, tá stór stevna varð hildin í Svimjihøllini í Havn um vikuskiftið.

Og her eydnaðist tað okkara svimjarum at vinna á grannatjóðini, sum annars varð mett at hava sterkara liðið.

Endaliga úrsliti av dystinum gjørdist 101-79 til Føroyar, sum soleiðis vunnu ein hampuliga greiðan sigur.

Og fleiri met vórðu eisini sett á vegnum. Hjá kvinnum gjørdist talan um nýtt junior-met í 50 metra rygg, 400 metra frí og 50 metra frí, meðan blandaða stafettin á 50 metrum hjá monnum eisini betraði metið, sum varð sett í Álandi í summar. Hartil svam Pál Joensen eina split-tíð, sum var betri enn metið á 100 metrum, tá kappast varð í 200 metrum bringusvimjing hjá monnum.

Mona Simonsen hjá Føroyum fekk steyp sum tann kvinnan, ið hevði staðið seg best í kappingini, meðan Jakob Jóhann Sveinsson úr Íslandi fekk steyp sum besti svimjarin hjá monnum.

## FAKTA

**Junior-metini**

| | | |
|---|---|---|
| **50 metra rygg** | Birita Debes | 29,62 |
| **400 metra frí** | Cecilia Eysturdal | 4.36,21 |
| **50 metra frí** | Birita Debes | 27,11 |
| **50 metra firvald** | Astrið Foldarskarð | 30,50 |

Met

| | | |
|---|---|---|
| 4X50 blandað | menn | 1.44,41 |